Pál Weihe væntar inntøkur av ílegugransking í Føroyum

Hósdagin vórðu politikarar og embætisfólk kunnaði um lógaruppskotið um ílegugransking. Uppskotið verður lagt fyri løgtingið í næstum

GRANSKING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Pál Weihe greiddi á fundi hósdagin frá lógaruppskotinum um ílegugransking, sum hann væntar fer at geva føroyska samfelagnum inntøkur

Mynd: Ragnfríð K. Jacobsen

Hósdagin var framløga í Almanna-og Heilsumálaráðnum av lógaruppskotinum um ílegugransking.

Framløgan var í fyrsta lagi ætlað politikarum og embætisfólki, og eini 30 fólk – tey flestu umboðandi samgonguna, men onkur eisini umboðandi andstøðuna - vóru komin saman at lýða á, meðan Pál Weihe, lækni og granskari, greiddi frá uppskotinum.

Uppskotið um ílegugransking byggir í fyrsta lagi á eitt arbeiði, sum ein arbeiðsbólkur hevur gjørt, men er eisini tillagað altjóða reglum, sum eru galdandi á økinum.

Eftir framløguna var høvið hjá tíðindafólki at seta spurningar.

Inntøkukelda

Pál Weihe er sannførdur um, at íllegugransking í Føroyum sum frálíður kann gerast ein inntøkukelda fyri landið, samstundis sum hetta arbeiði fer at geva okkum týðandi vitan, sum kann brúkast á nógvum økjum.

Tað er Pál Weihe, sum hevur staðið fyri arbeiðnum at skipa eitt ílegusavn, sum nú væntandi verður sett á stovn undir føroyska heilsuverkinum.

Ætlanin um gransking í ílegum – ella genum, sum tað eitur á donskum, er nøkur ára gomul. Men higartil hevur ikki borið til at granska í føroyskum ílegum, tí einki lógargrundarlag hevur verið.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður á økinum, er nú av álvara farin at gera nakað við hetta, og nú er lógaruppskotið um at seta á stovn eitt ílegusavn um at verða klárt at bera í tingið.

– Eg ivist ikki í ,at ílegusavnið verður ein góð íløga fyri føroyska samfelagið - ikki minst tí, at eitt nú útlendskar fyritøkur eru til reiðar at gjalda fyri at fáa fatur á føroysku ílegunum, sigur granskarin, sum stendur fyri arbeiðnum at fyrireika ílegusavnið.

Ílegugransking:

Kim tekur sær av mannarættindunum

Kim Pagels, sum er løgfrøðingur í Almanna-og Heilsumálaráðnum, hevur eisini verið við til at sett síni fingramerki á lógaruppskotið um ílegugransking

GRANSKING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Kim Pagels, løgfrøðingur, vísir á, at hóast ílegugranskingin fer at byggja á upplýsingar frá fólki, sum ikki verða skrásett við navni, er neyðugt, at tey, sum eru við, í hvørjum einstøkum føri geva sítt játtilsi til hetta. Myndin er tikin á framløgufundinum hósdagin

Mynd: Ragnfríð K. Jacobsen

Luturin hjá honum hevur eitt nú verið at syrgt fyri, at uppskotið samsvarar altjóða reglum og avtalum, tá ið ræður um rættindini hjá teimum, sum eru við í granskingini. Somuleiðis hevur hann havt til uppgávu at syrgja fyri, at lógaruppskotið ikki er í stríð við aðrar lógir á økinum.

Kim vísir á, at hóast ílegugranskingin fer at byggja á upplýsingar frá fólki, sum ikki verða skrásett við navni, er neyðugt, at tey, sum eru við, í hvørjum einstøkum føri geva sítt játtilsi.

– Skal ein blóðroynd, hárroynd ella vevnaður hjá fólki nýtast í granskingini, er neyðugt, at fólk geva sítt samtykki – sjálvt um tey eru ónevnd, sigur hann.

Væntar samtykki

Spurdur, um hann væntar, at løgtingið fer at taka undir við nýggja lógaruppskotinum um ílegugransking, sigur Kim Pagels, at tað er torført at meta um.

– Nýggja uppskotið tekur støði í uppskotinum, sum løgtingið feldi í 1999, men við tí uppskotinum vóru nakrir "tekniskir trupulleikar", sum hann tekur til.

Sum skilst á Kim, væntar hann, at úrslitið hesaferð verður øðrvísi, og verða tað ikki fíggjarligar forðingar, væntar hann, at løgtingið fer at samtykkja at farið verður undir ílegugransking í Føroyum.

– Ætlanin er, at tað almenna í fyrstu syfti skal bera kostnaðin av at seta á stovn teir tríggjar "databasarnar", sum ílegusavnið byggir á. Síðan er væntandi, at áhugin fyri at keypa vitanina í útlandinum verður somikið stórur, at granskingin fer at geva inntøkur til tað almenna, sigur Kim Pagels, løgfrøðingur.

Matvørurvinnan á skúlabonk

Í næstum fer Fiskivinnuskúlin undir skeiðsrøð, sum hevur til endamál at betra um matvørutrygd og innaneftirlit hjá matvøruframleiðarum

Í tíðindaskrivi sigur Fiskivinnuskúlin, at endamálið við skeiðnum er at flyta og betra hugburðin hjá luttakarunum og at økja um vitanina um matvørutrygd og innaneftirlit.

Skeiðsrøðin vendir sær fyrst og fremst til matvøruframleiðandi virki á sjógvi og landi, sum longu hava eitt innaneftirlit, og til tey virki, sum framleiða til heimamarknaðin, og sum hava fingið boð um at skipa eitt innaneftirlit. Hetta merkir, at skeiðið er ætlað stjórum, góðskuleiðarum, formonnum og starvsfólki, sum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðnum og í framleiðsluni á virkin-um.

Skeiðið verður skipað við fyrilestrum, sum fólk frá vinnuni og tí almenna halda, og við kjaki og bólkaarbeiði. Luttakararnir fáa ikki nógv tilfar at lesa, men avrit av framløgum, og teir læra eisini, hvussu teir kunnu halda sína vitan viðlíka.

Umframt sjálvt skeiðið, verður talaln eisini um uppfylging av evninum. Tá skeiðið er liðugt, bjóða fyrireikararnir seg til at koma út á arbeiðsplássini at ráðgeva um ítøkiligar spurningar í sambandi við matvørutrygd og innaneftirlit.

Skeiðið verður skipað í tríggjar eindar á 2 dagar í mars og apríl.